## Nógvur reki

Undir vanligum umstøðum hevði tað verið hugaligt at verið rekamaður á jútsku vesturstrondini í hesum døgum. Eitt farmaskip av Malta misti alla dekslastina í illveðri í Norðsjónum seinasta vikuskiftið, og nú er viðurin rikin inn á land. Tað er ikki eiti á reki, tí viðurin er spjaddur fleiri kilometrar eftir fjøruni. Men rekamenninir fáa einki burturúr, tí reglurnar siga, at myndugleikarnir eiga rekan, og at hann skal seljast á uppboði.

## Gággan væl umtókt

Klaksvíksbáturin Komet, sum roynir við rúsum eftir gággu, gjørdi ein góðan túr mánadagin. Teir høvdu 670 rúsur í sjónum, og tá avreitt varð gjáramorgunin, vigaði tað 3.120 kilo. Tað er 400 kilo meiri, enn teir hava fingið fyrr. Tað stendur heldur ikki á at sleppa av við gággurnar til agn. Fýra útróðrarbátar í Klaksvík keyptu gágguna, og sambært Norðlýsinum hava útróðrarmenn í Vágur og Eysturoynni eisini víst áhuga fyri gággu frá Komet.

# Skeljavinnan er størsta aktiv hjá O. C. Holding



Meðan rækjuframleiðslan á Oyri fyribils er søga, halda nýggju eigararnir í O. C. Holding, at skeljavinnan er áhugaverd

Mynd: Vilmund Jacobsen

**- Rækjuvirksemið á Oyri er helst ein farin tíð - í hvussu er fyribils. Hinvegin er skeljavinnan áhugaverd, sigur Gunnbjørn Joensen, stjóri í P/F Thor, sum nú eigur meirilutan í O. C. Holding**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Thor í Hósvík, sum seinastu 10-12 árini hevur vaksið seg til eitt av størstu vinnufeløgunum í Føroyum, eigur nú 60% av partapeninginum í O. C. Holding á Oyri. Uppi í nýggju ognunum, sum Thor nú eigur meirilutan í, er skeljavirki, skeljatrolarin Norðheim, gággubáturin Varðborg, rækjuvirki og eitt frystihús. Aftrat hesum er eitt rækjuloyvi.

Thor hevur eini 400-500 fólk í starvi, harav umleið ein triðingur eru føroyingar, sum sigla við skipum hjá felagnum og starvast á skrivstovum.

### Fleiri bein

Annar av stjórunumí P/F Thor, Gunnbjørn Joensen, sigur, at felagið hevur gjørt íløguna í O. C. Holding fyri at fáa felagnum fleiri bein at standa á, sum hann tekur til.

Hann heldur, at handilin, sum felagið gjørdi við ársenda í 2006, er skilagóður.

Vit hava spurt Gunnbjørn, um felagið umhugsar at fara undir rækjuvirksemi aftur á Oyri, nú framleiðslan á virkinum hevur ligið still í eitt ár.

Men tað væntar hann ikki – ikki fyribils í hvussu er.

– Nei, eg vil ikki siga, at tað er rækjuframleiðsla, sum lá frammaliga í huganum, tá ið vit keyptu. Undir teimum umstøðum, sum eru í løtuni, er hetta fyribils ein farin tíð. Og tó. Vit vita ikki, hvat liggur fyri framman.

Gunnbjørn sigur, at hann ikki vil útiloka, at virkið einaferð í framtíðini aftur letur upp sum rækjuvirki.

– Men hetta er ikki nakað, sum liggur í "pappírunum", tí eingin økonomiur er í hesi framleiðslu í løtuni, leggur hann aftrat.

Stjórin sigur, at skeljavirksemi, sum eftirhondini hevur nógv ár á baki, fer at halda fram.

– Tað er serliga hesin parturin av virkseminum hjá O. C. Holding, sum er áhugaverdur, haldi eg, sigur Gunnbjørn Joensen, sum var upptikin og fáorðaður, tá ið vit hittu hann í telefonini.

### Nýtt veiðiøki

Edmund Joensen, sum í mong ár hevur verið "prim-us-motorur" aftanfyri virksemið á Oyri, og sum nú saman við bróðuri sínum, Hans, er minniluta eigari í O. C. Holding, sigur, at Norðheim fiskar eini 4.000 tons av jákupsskel í vertíðini. Burtur úr hesum eru eini 10% kjøt – alt eftir, hvussu skelin er til dygdar.

– Gongur væl at dreggja, kann Norðheim gera ein túr um samdøgnið, og á einum slíkum túri hevur hann eini 55 tons, sigur hann.

Vinnuliga veiðiøkið hjá Norðheim hevur higartil verið eystanfyri, men í fleiri ár hevur skipið saman við Fiskirannsóknarstovuni eisini gjørt royndir norðanfyri. Í hesum sambandi eru kanningar gjørdar av, hvussu dreggini fara við botninum og vistskipanini á botni.

– Útróðrarmenn hava verið skeptiskir um skeljaveiði norðanfyri, men nú letur til, at eitt økið verður klárt at fara inn á, soleiðis at skipið bæði kann veiða eystanfyri og norðanfyri.

Edmund Joensen heldur tað hava stóran týdning fyri skeljavinnuna, at skipið kann sleppa royna bæði eystanfyri og norðanfyri.

– Tað hevði verið ein fyrimunur, um skipið kundi veitt umleið helmingin av árligu veiðini eystanfyri – og hin helmingin norðanfyri. Tá hevði veiðan verið meira samanhangandi, báðu megin oyggjarnar, sigur hann.



– Tað er eingin økonomiur í rækjuframleiðsluni í løtuni, og tí liggur hetta ikki í kortunum, sigur Gunnbjørn Joensen

Mynd: Jens Kr. Vang



Edmund Joensen, sum nú er minniluta eigari, veit at siga, at Norðheim nú sleppur norður um at dreggja eftir skeljum

Mynd: Vilmund Jacobsen